Mentamálaráðið

Dagfesting:	02. sept. 2026
Mál nr.:	26/12233-20
Málsviðgjørt:	TVR
Ummælisfreist:	Skrivið frá/til
Eftirkannað:	Lógartænastan dagfestir

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul
(Rakstrarstuðul og staðbundin stuðul og aðrar smærri tillagingar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 35 frá 31. mars 2017 um miðlastuðul (Miðlastuðulslógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 74 frá 5. mai 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 3, stk. 1 verður aftan á nr. 1 sum nýggj nr. sett:
"2) fyri at fáa grundupphædd, sambært § 4, stk. 2, 1. pkt., ella staðbundnan miðlastuðul, sambært § 4, stk. 4, skal miðilin íroknað tann ábyrgdarhavandi redaktørin í minsta lagi hava eitt hálvt redaksjonelt ársverk í føstum starvi,
3) fyri at fáa lut í lutfalsligu upphæddini, sambært § 4, stk. 2, 2. pkt., skal miðilin íroknað tann ábyrgdarhavandi redaktørin í minsta lagi hava eitt heilt redaksjonelt ársverk í føstum starvi,"
Nr. 2 og 3 verða eftir hetta nr. 4 og 5.

2. Í § 3, stk. 2 og stk. 3 verður "1-3" broytt til: "1-5".

3. § 4 verður orðað soleiðis:
"**§ 4.** Stuðulsupphæddin tekur støði í tali á umsøkjarum, sum lúka treytirnar, og játtan á fíggjarlógini. Miðlastuðul verður latin sum rakstrarstuðul og staðbundin stuðul, sbr. stk. 2 og 3.
Stk. 2. Av árligu játtanini á fíggjarlógini til miðlastuðul verða 90% latin sum rakstrarstuðul til miðlar og miðlasamtøk, harav 40% verða latin sum ein grundupphædd, býtt javnt millum nevndu miðlar ella miðlasamtøk, ið lúka treytirnar í § 3, stk. 1, nr. 1, 2, 4 og 5. 60% av árligu játtanini verða latin sum ein eins lutfalslig upphædd í prosentum av skjalprógvaðu rakstrarútreiðslunum árið fyri umsóknarárið hjá viðkomandi miðli ella miðlasamtaki, ið lýkur treytirnar í § 3, stk. 1, nr. 1, 3, 4 og 5.
Stk. 3. Rakstrarútreiðslur sambært stk. 2 verða gjørdar upp við støði í góðkenda roknskapinum hjá viðkomandi miðli ella miðlasamtaki roknskaparárið undan umsóknarárinum.
Stk. 4. Av árligu játtanini á fíggjarlógini til miðlastuðul verða 10% latin sum staðbundin miðlastuðul, ið verður býttur javnt millum teir

umsøkjarar, ið lúka treytirnar í §§ 1-3, stk. 1, nr. 1, 2, 4 og 5, og sum fyri størsta partin av árinum fyri umsóknarárið høvdu høvuðssæti í kommunum við 10.000 ella færri íbúgvum.
Stk. 5. Samlaði rakstrarstuðulin sambært stk. 2, hjá einum miðli ella miðlasamtaki, kann í mesta lagi vera 40% av skjalprógvaðu rakstrarútreiðslunum árið fyri umsóknarárið.
Stk. 6. Um mesta markið sambært stk. 5 ger, at avlop verður á rakstrarstuðlinum, verður avlopið býtt javnt millum teir umsøkjarar, ið lúka treytirnar fyri rakstrarstuðli."

4. Í § 5, stk. 1, stk. 3, §§ 6 og 7, stk. 3 og 4, § 9, stk. 2, sum verður stk. 3, verður "Landsstýrismaðurin" broytt til: "Landsstýrisfólkið".

5. Í § 7, stk. 3 verður "landsstýrismanninum" broytt til: "landsstýrisfólkinum".

6. § 8, stk. 4 verður strikað.
Stk. 5 verður eftir hetta stk. 4.

7. Í § 9, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Forfólkið kann tó sjálvt avgreiða smærri mál."

8. Í § 10, stk. 1 verður "§ 8, stk. 5" broytt til: "§ 8, stk. 4".

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2027.
Stk. 2. Tilsagnir um miðlastuðul til verkætlanir eru galdandi til og við 31. mars 2027 og fella hareftir burtur.
Stk. 3. Støðlaður peningur til verkætlanir, ið ikki eru lidnar í seinasta lagi 31. mars 2027, fellur aftur til landskassan.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Í samgonguskjalinum stendur, at skipanin við miðlastuðli verður endurskoðað. Hildið verður, at rættari er at styrkja verandi miðlar enn at økja um talið á miðlum og miðlaverkætlanum, har síðstnevndu hava víst seg at hava verið sera avbjóðandi at umsita. Harumframt hava atfinningar verið, at skipanin við verkætlanarstuðli er ov stýrandi í mun til journalistiska frælsið.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært galdandi lóggávu verða 70% av árligu játtanini til miðlastuðul á fíggjarlógini settar av til verkætlanir, sum leggja seg eftir at gera loftborið ella skrivligt tilfar, sum verður mett at hava journalistiska dygd og samfelagsligt virði, sbr. § 4, stk. 2, 1. pkt. í galdandi lóg. Írestandi nøgdin verður latin sum ein eins lutfalslig upphædd í prosentum av skjalprógvaðu lønarútreiðslunum árið fyri umsóknarárið.

Um hugt verður at verkætlanarstuðlinum, hava atfinningar m.a. verið, at tað er ov stýrandi fyri journalistiska frælsið, at miðilin skal halda seg innan karmarnar av einari verkætlan, ið er send inn til Miðlastuðulsnevndina saman við umsóknini. Eisini hevur tað víst seg, at fleiri av verkætlanunum ikki bera á mál, og at tað er avbjóðandi hjá nevndini at hava eftirlit við verkætlanargongdunum. Av tí sama er tað fleiri ferðir hent, at peningur er støðlaður gjøgnum fleiri fíggjarár. Um ein miðil fer á húsagang, hevur ivi eisini verið um, hvør hevur rættin til miðlastuðulin - persónarnir handan verkætlanina, trotabúgvið ella tann, ið hevur keypt rættin at bera navn, búmerki o.a.

Ynski hevur tí verið frá teimum flestu um at fara aftur til nakað, ið minnir um ta fyrstu skipanina, men sum eisini fevnir um annað enn bert lønarútreiðslur, t.e. rakstrarútreiðslur til eitt nú lønir, rakstur av sendineti o.tíl. rakstrarútreiðslur. Tó so at eitt loft er ásett fyri, hvussu nógv ein miðil ella miðlasamtak kann fáa í rakstrarstuðli. Loftið er 40% av skjalprógvaðu rakstrarútreðslunum árið fyri umsóknarárið.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at skapa størri journalistiskt frælsi við ikki at knýta miðlastuðulin at ávísum verkætlanum. Eisini er endamálið at gera skipanina munandi einfaldari at umsita.

Útjavningarpolitisk atlit tala fyri at rógva aftur á aftur skipanina, har størsti parturin av miðlastuðulin verður býttur millum eina fasta grundupphædd áljóðandi 40% av játtanini á fíggjarlógini, ið verður býtt javnt millum teir miðlar, ið lúka treytirnar ávikavist eina lutfalslig upphædd í prosentum av skjalprógvaðu útreiðslunum árið fyri umsóknarárið. Síðstnevndi parturin fer at gagna teimum miðlum og miðlasamtøkum, ið hava stórar rakstrarútreiðslur tó so, at eitt loft er ásett áljóðandi 40% av skjalprógvaðu rakstrarútreiðslunum, sum eisini var í fyrstu skipanini. Hetta fer at gera, at miðlar við sera stórum rakstrarútreiðslum ikki kunnu fara avstað við tí mesta av rakstrarstuðlinum. Staðbundni stuðulin verður ikki íroknaður í tey 40 prosentini.

Eitt annað endamál við skipanini er at styrkja um smærru og staðbundnu miðlarnar, soleiðis at 10% av samlaðu játtanini til miðlastuðul verða býtt javnt millum teir miðlar, ið lúka treytirnar í §§ 1-3 í lógini. Viðkomandi miðil skal hava høvuðssæti í einari kommunu, ið hevur 10.000

ella færri íbúgvar. Talið 10.000 er sett, so at atlit eisini kann havast at møguligum kommunusamanleggingum.

Við høvuðssæti skal skiljast tað staðið, har miðilin hevur sína høvuðsskrivstovu sambært viðtøkum, skrásetingum o.ø., og har størsti parturin av virkseminum hjá miðlinum má metast at vera farið fram árið fyri umsóknarárið. Fyri at sleppa undan spekulatión við flyting av høvuðssæti verður sett sum treyt, at miðilin fyri størsta partin av árinum fyri umsóknarárið skal hava havt høvuðssæti í kommunum við 10.000 ella færri íbúgvum, og tað áliggur viðkomandi miðli at skjalprógva tað.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið býtir játtanina á fíggjarlógini til miðlastuðul í tveir partar. Ein rakstrarpart (90%) og ein part til staðbundnar miðlar (10%).

Rakstrarparturin áljóðandi 90% av árligu játtanini á fíggjarlógini til miðlastuðul verður aftur býttur í tveir partar, har 40% er ein grundupphædd, ið verður býtt javnt millum teir miðlar, ið lúka treytirnar. 60% verða latin sum ein lutfalslig upphædd í prosentum av skjalprógvaðu rakstrarútreiðslunum árið fyri umsóknarárið hjá viðkomandi miðli ella miðlasamtaki, tó so at eingin miðil fær meiri enn 40% av skjalprógvaðu rakstrarútreiðslunum árið fyri umsóknarárið í rakstrarstuðli – men tá er staðbundni stuðulin ikki íroknaður.

Staðbundni stuðulin áljóðandi 10% av árligu játtanini á fíggjarlógini verður býttur javnt millum teir umsøkjarar, ið lúka treytirnar í §§ 1-3, stk. 2, nr. 1,2, 4 og 5, og sum hava høvuðssæti í kommunum við 10.000 ella færri íbúgvum.

Fyrimunirnir við uppskotinum eru, at skipanin verður minni stýrandi og ikki tongd at ávísum verkætlanum. Skipanin í uppskoti fer eisini at geva verandi miðlum størri frælsi at leggja sítt egna virksemi til rættis, eins og hon verður einfaldari at umsita, tí ongar verkætlanir verða at meta um og at hava eftirlit við.

Eisini kann hugsast, at skipanin í uppskoti fer at tryggja størri margfeldi í føroyska miðlalandslagnum við tað, at smærru miðlarnir kring landið fara at fáa munandi størri part av miðlastuðlinum, tí hesir fáa, umframt grundupphæddina, part av teimum 10 prosentunum av játtanini til staðbundnar miðlar, um teir lúka krøvini í §§ 1-3, stk. 2, nr. 1, 2, 4 og 5.

Ein vansi kann vera, at tað verður ávís ónøgd um, at miðlar í høvuðsstaðarøkinum ikki fara at fáa lut í stuðlinum til teir staðbundnu miðlarnar, men tá skal havast í huga, at miðlar í høvuðsstaðarøkinum mest sannlíkt fara at fáa størsta partin av lutfalsliga rakstrarstuðlinum, har minsta kravið er eitt heilt redaksjonelt ársverk í føstum starvi, meðan minsta kravið fyri grundupphæddini og staðbundna miðlastuðlinum er eitt hálvt redaksjonelt ársverk í føstum starvi.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Upplýst verður, hvørjir myndugleikar, almennir stovnar, privatir felagsskapir, áhugafeløg og onnur hava havt uppskotið til ummælis. Greitt verður í stuttum frá, hvørjar viðmerkingar ummælispartarnir hava gjørt. Greitt verður eisini frá, hvørja støðu landsstýrisfólkið og stjórnarráðið hava til hesar viðmerkingar. Hetta ger, at møguligar avleiðingar av uppskotinum verða umhugsaðar og lýstar betur.

Um eitt uppskot ikki er sent til ummælis, eigur at verða greitt frá, hvør orsøkin er til tað. Eisini eigur at vera upplýst, um fundir, annað samskifti o.tíl. hevur verið við viðkomandi partar fyri at bøta um manglandi ummæli.

Eitt ummælisskjal eigur eisini at verða gjørt. Ummælisskjalið er ein stuttur samandráttur av innkomnu ummælunum saman við viðmerkingum hjá landsstýrisfólkinum til hesi. Serliga til uppskot, har nógv ummæli eru komin inn, er ummælisskjal eitt hent amboð, sum gevur greitt yvirlit yvir tey ummælini, sum eru komin inn.

Dømi: Løgtingsmál 51/2019, løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum.

Ummælini verða løgd við sum fylgiskjal til uppskotið. Hvørt ummæli skal í skjal fyri seg, og skjalið skal vera í PDF-sniði.
(Sí nr. 1.2.1.6. í rundskrivinum um lógarsmíð).

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið verður fíggjað við játtan á fíggjarlógini. Í fíggjarlógini fyri 2026 blivu 4,9 mió. kr. játtaðar til endamálið. Harumframt hevur Miðlastuðulsnevndin eina játtan áljóðandi 100.000,00 kr. til umsiting, sakkøna hjálp, fundarpening, fasta samsýning til forfólkið o.tíl.

Fíggjarligu avleiðingarnar eiga at verða lýstar í einari talvu.

	2025	2026	2027	2035	2045
Miðlastuðul	2,9 mió.	4,9 mió.	4,9 mió.	4,9 mió.	4,9 mió.
Útreiðslur til Miðlastuðulsnevndina	100 tús.	100 tús.	100 tús.	100 tús.	100 tús.
Tilsamans	3 mió.	5 mió.	5 mió.	5 mió.	5 mió.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður, at uppskotið fer at hava minni umsiting við sær, tí við uppskotinum verður støði tikið í tali av umsøkjarum, ið lúka treytirnar og játtanini á fíggjarlógini, har 90% fara til rakstrarútreiðslur býtt millum eina grundupphædd (40%) og ein lutfalsligan stuðul (60%) ávikavist 10% av játtanini fara til staðbundnar miðlar. Hetta merkir so eisini, at tað ikki verða fleiri verkætlanir at meta um, at hava eftirlit við og at eftirmeta. Eisini er ásett í skiftisregluni, at verandi verkætlanir fáa freist til 31. mars 2027 at verða lidnar. Í galdandi kunngerð er freistin 1. apríl árið eftir umsóknarárið, men Miðlastuðulsnevndin hevur í síni venju longt hesa freistina, soleiðis at tað nú eru fleiri verkætlanir, ið hava støðlaðar pengar gjøgnum fleiri fíggjarár. Nú verður eisini ásett í skiftisregluni, at verkætlanir skulu vera lidnar í seinast lagi 31. mars 2027, og at støðlaður peningur fellur aftur til landið, um verkætlanirnar handan peningin ikki eru endaðar tá. Á tann hátt verður ruddað upp, so at klárt er at fara undir nýggju skipanina.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið fer at hava jaligar avleiðingar fyri miðlavinnuna, tí framyvir fær vinnan størri frælsi at skipa sítt virksemi uttan at skula verða knýtt at ávísari verkætlan. Harumframt skulu miðlar ikki longur brúka tíð og orku upp á at orða umsóknir, verkætlanarlýsingar o.a. Eisini kann hugsast, at margfeldið í føroyska miðlalandslagnum kann gerast størri við einum staðbundnum miðlastuðli, ið fer at styrkja miðlarnar kring landið, tí hesir fara helst ikki at fáa eins nógv av lutfalsliga rakstrarstuðlinum og summir av høvuðsstaðarmiðlunum.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður, at uppskotið fer at betra um umstøðurnar hjá miðlum, sum hava sítt høvuðssæti í kommunum við 10.000 ella færri íbúgvum, tí 10% av samlaðu játtanini er oyramerkt til staðbundnar miðlar, sbr. nærri um høvuðssæti í pkt. 1.3 omanfyri.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir sum so. Hugsast kann, at arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkum i miðlavinnuni gerast støðugari av, at partur av rakstrinum telur uppí stuðulsheimilaða virksemið hjá viðkomandi miðli ella miðlasamtaki.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Mett verður ikki, at uppskotið er fevnt av millumtjóðasáttmálum á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) Mett verður ikki, at tað er ein positiv skylda hjá Føroyum í mun til EMRS at hava eina skipan við miðlastuðli, men hóast tað verður mett, at eitt styrkt miðlalandslag sampakkar væl við EMRS, grein 10 (1), ið verjir skrivi-, talu- og framsøgufrælsið.

2) Mett verður ikki, at uppskotið er fevnt av Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar og flytføri
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir ella panti-heimildir, ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Nei.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Nei.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Nei.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?
Nei.

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar. Talan er um eina skipan, sum longu er í gildi, men sum verður broytt frá einari skipan við verkætlanarstuðli og stuðli til lønarútreiðslur til eina miðlastuðulsskipan við rakstrarstuðli og staðbundnum miðlastuðli.

2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Ja	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1.
Talan skal í minsta lagi vera um eitt hálvt redaksjonelt ársverk í føstum starvi fyri, at miðilin kann fáa grundupphædd ella staðbundnan miðlastuðul ávikavist eitt heilt redaksjonelt ársverk fyri at fáa lut í lutfalsliga stuðlinum. Í dag er eingin treyt um nakað ársverk, tí ein slík trey hevði avmarkað møguleikan at fáa lut í verkætlanarstuðlinum.

Í fyrstu lógini frá 2016 var treytin, at miðilin, íroknað tann ábyrgdarhavandi redaktørin, í minsta lagi tilsamans skuldi hava tvey heil redaksjonell ársverk í starvi. Mett verður at treytin um eitt hálvt redaksjonelt ársverk fer í stóran mun at geva smærri miðlunum møguleika at fáa lut í miðlastuðlinum.

Viðkomandi skal vera í føstum starvi, og redaksjonella ársverkið skal vera samsvarandi viðkomandi sáttmála.

Verður hugt at lønartalvuni hjá Starvsfelagnum frá 1. oktober 2025, ið eisini fevnir um fjølmiðlafólk, so fær eitt fjølmiðlafólk, ið er fevnt av bachelor-stiganum, kr. 41.460,17 í byrjanarløn um mánaðan, íroknað eftirløn áljóðandi 15%, t.e. ein árlig løn áljóðandi kr. 497.522,04. Eftir átta árum fær viðkomandi endaløn áljóðandi kr. 47.605,69 í løn um mánaðan, íroknað eftirløn, t.e. ein árlig løn áljóðandi kr. 571.268,28. Tá eru møguligar viðbøtur o.a. ikki tiknar við. Sostatt skal talan vera um helvtina av viðkomandi løn, ið verður sett sum minsta mark fyri ársverkum. Viðkomandi umsøkjari má sjálvur grundgeva fyri sínum starvsaldri, tá ið søkt verður um miðlastuðul.

Talan skal vera um redaksjonell starvsfólk, t.e. tíðindafólk, ið skriva tíðindi og/ella ritstjórna tíðindi, myndafólk, blaðteknarar, grafikarar, fólk, ið gera kanningararbeiði fyri miðilin (researchers), o.fl., ið arbeiða við redaksjonella tilfarinum hjá miðlinum.

Til nr. 2.
Tvey nummur koma afturat, og sostatt verður nr. 1-3 til nr. 1-5.

Til nr. 3.
Játtanin til miðlastuðul verður býtt í tveir partar. 90 % fara til rakstur, og 10% fara til staðbundanr miðlar í kommunum við 10.000 ella færri íbúgvum.

Játtanin á fíggjarlógini til miðlastuðul í 2026 er 4,9 mió. kr. Tað er við støði í árligu játtanini á fíggjarlógini og talinum á umsøkjarum, at stuðulsupphæddin verður roknað. Stuðulin til rakstur verður latin sum ein grundupphædd áljóðandi 40% av teimum 90 prosentunum, ið verður býtt javnt millum teir umsøkjarar, ið lúka treytirnar í lógini. Á tann hátt verður teimum øllum tryggjað ein eins grundupphædd. Síðani verður restini av rakstrarstuðlinum latin sum ein eins lutfalslig upphædd í prosentum av skjalprógvaðum rakstrarútreiðslum, ið verða gjørdar upp við støði í áteknaða roknskapinum árið fyri umsóknarárið. Samlaði miðlastuðulin til rakstur, t.e. grundupphædd og lutfalslig upphædd, kann tó í mesta lagi verða 40% av skjalprógvaðu rakstrarútreiðslunum hjá tí einstaka miðlinum ella miðlasamtakinum árið fyri umsóknarárið. Staðbundi stuðulin telur ikki uppí tey 40 prosentini.

Lutfalsligi stuðulin ger, at teir miðlar, ið hava høgar rakstrarútreiðslur, fáa mest í miðlastuðli, meðan grundupphæddin er við til at tryggja smærru miðlunum ein part av miðlastuðlinum, og tískil er treytin um ársverk eisini minni til grundupphædd og staðbundna stuðulin enn til lutfalsliga stuðulin.

Rakstrarútreiðslur fevna um vanligan rakstur, t.e. eitt nú útreiðslur til útgerð, hita, el, sendinet, brennievni, útreiðslur til fríyrkisfólk og vanligar lønir. Byggiútreiðslur, umbyggingarútreiðslur og aðrar størri íløgur verða ikki mettar sum partur av útrokningargrundarlagnum.

Dømi um útrokning av miðlastuðli:

Settar eru 4,9 mió. kr. av á fíggjarlógini til miðlastuðul. Av hesum verða 90% sett av til rakstur, t.e. 4.410.000 kr., harav 1.764.000 (40%) verða settar sum føst grundupphædd býtt javnt millum teir miðlar, ið lúka treytirnar.

60% av rakstrarstuðlinum verða latin sum til lutfalsligur stuðul í mun til skjalprógvaðu útreiðslurnar árið fyri umsóknarárið, t.e. 2.940.000 kr.

10% av samlaðu játtanini verða latin sum ein staðbundin stuðul, t.e. 10% av 4,9 mió. kr. = 490.000 kr.

Dømi við umsøkjarum:

Játtan til miðlastuðul (kr.) 4.900.000 kr.
Rakstrarstuðul, 90% av játtan 4.410.000 kr.
Staðbundin stuðul, 10% av játtan 490.000 kr.

Rakstrarstuðul	
(A) Føst grundupphædd, 40 % av rakstrarstuðli	1.764.000 kr.
(B) Lutfalsligur stuðul, 60% av rakstrarstuðli	2.646.000 kr.

Rakstrarútreiðslur sambært góðkendum umsóknum (kr.)	
Fjølmiðil 1	12.000.000 kr
Fjølmiðil 2	3.000.000 kr.
Fjølmiðil 3	2.300.000 kr.
Fjølmiðil 4	2.000.000 kr.
Fjølmiðil 5	1.800.000 kr.
(C) Rakstrarútreiðslur í alt	21.100.000 kr
(D) Tal av fjølmiðlum, sum fáa stuðul	5 fjølmiðlar

Stuðulin til grundupphædd verður funnin við at býta talið á fjølmiðlum (D) upp í játtanina til fasta grundupphædd (A). Stuðulsprosentið til lutfalsligan stuðul verður funnið við at býta samlaðu rakstrarútreiðslurnar (C) upp í játtanina til lutfalsligan stuðul (B) sum prosent.

Grundupphædd (A/D)	352.800 kr.
Stuðulsprosent (B/C) * 100	12,54%

Útroknaður rakstrarstuðul	Grundupphædd	Lutfalsligur stuðul (12,54%)	Rakstrarstuðul samlað
Fjølmiðil 1	352.800 kr.	1.504.800 kr.	1.857.600 kr.
Fjølmiðil 2	352.800 kr.	376.200 kr.	729.000 kr.
Fjølmiðil 3	352.800 kr.	288.420 kr.	641.220 kr.
Fjølmiðil 4	352.800 kr.	250.800 kr.	603.600 kr.
Fjølmiðil 5	352.800 kr.	225.720 kr.	578.520 kr.
Rakstrarstuðul í alt	1.764.000 kr.	2.646.000 kr.*	4.410.000 kr.*
**Fyrivarni verður tikið fyri avrundingum*			

Um staðbundi miðlastuðulin verður tikin við, og fjølmiðil 3, 4 og 5 lúka treytirnar fyri honum, sær dømið soleiðis út.

Útroknaður miðlastuðul	Grund-upphædd	Lutfalsligur stuðul (12,54%)	Rakstrarstuðul samlað	Staðbundin stuðul	Roknaður miðlastuðul samlað
Fjølmiðil 1	352.800 kr.	1.504.800 kr.	1.857.600 kr.	0 kr.	1.857.600 kr.
Fjølmiðil 2	352.800 kr.	376.200 kr.	729.000 kr.	0 kr.	729.000 kr.
Fjølmiðil 3	352.800 kr.	288.420 kr.	641.220 kr.	163.333 kr.	804.553 kr.
Fjølmiðil 4	352.800 kr.	250.800 kr.	603.600 kr.	163.333 kr.	766.933 kr.
Fjølmiðil 5	352.800 kr.	225.720 kr.	578.520 kr.	163.333 kr.	741.853 kr.
Rakstrarstuðul í alt	1.568.000 kr.	2.352.000 kr.*	3.343.000 kr.*	1.470.000 kr.	4.900.000*
**Fyrivarni verður tikið fyri avrundingum*					

Skuldi samlaði miðlastuðulin verið hægri enn 40%, fer avlopið til hinar, ið lúka kravið til rakstrarstuðul. Staðbundni stuðulin telur ikki uppí tey 40 prosentini.

Til nr. 4 og 5
Broyting í heitinum frá landsstýrismanni til landsstýrisfólk.

Til nr. 6
Tøknilig broyting av tí at verkætlanarstuðulin verður strikaður.

Til nr. 7
Skotið verður upp, at forfólkið sjálvt kann avgreiða ávís smærri mál eitt nú áheitanir um innlit.

Til nr. 8
Tøknilig broyting.

Til § 2
Lógin kemur í gildi 1. januar 2027.
Tilsagnir eru galdandi til og við 31. mars 2027 og eftir tað, fella allar tilsagnirnar burtur, og møguligur stuðul, ið er støðlaður, fellur aftur til landskassan.

Mentamálaráðið, xx september 2026.

Bárður á Lakjuni
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: